## DAGSINS MEINING

# Fólkaflokkurin og fullveldi

Fólkaflokkurin er ein bólkur av einstaklingum, ið tykjast ganga í hvør sína ætt í nógvum málum. Tað tykist, sum um tað at ríða á tveimum hestum skal geva tvífalt so nógvar atkvøður til valið.

Vit kenna almennu linjuna hjá Fólkaflokkinum um, at marknaðarkreftirnar skulu ráða o.s.fr. Vit hava eisini sæð orðingar um "í kapping við aðrar", men tá til stykkis kemur, so er Fólkaflokkurin ein flokkur, ið langt frá altíð fylgir sínum egnu litføgru sloganum. Tíbetur tað vil onkur siga, tí marknaðurin klárar verri enn so alt. Fiskivinnupolitikkurin er eitt dømi, har Fólkaflokkurin bert vil lata marknaðarkreftirnar ráða helvtini. Teir halda tað er í lagi, at selja fyri vinning, men tað, at skula keypa og betala fyri tað, ið verður selt, tað tykist flokkurin hava eitt meira avslappað forhold til.

Tað er altíð eitt keðiligt eyðkenni, um flokkar hava tvær støður til mál, og eisini má tað sigast at verða óheppið at hava eitt avslappað forhold til sína egnu ideologi.

Vit kunnu hyggja at fullveldismálinum. Summir av toppkandidatunum í Fólkaflokkinum heita á fólk um at stuðla fullveldistilgongdini við at atkvøða fyri sær, meðan onnur Fólkafloksvalevni tosa um samveldissáttmála ella tílíkt. Hvat vil flokkurin? Er tað soleiðis, at politikkur floksins verður defineraður alt eftir hvør kemur inn? Hvat siga Fólkafloksveljarar í Vágum til at Poul Michelsen fiskar atkvøður í Suðurstreymi við at fullveldistilgongdin skal stuðlast?

Nú er eingin loyna, at individualisma altíð hevur eyðkent Fólkaflokkin, men alt má hava eitt mark. Tað kann ikki verða meiningin, at flokkurin gerst ein valsamgonga millum einkultpersónar, ið flaksa í hvør sína ætt.

Vónandi hevur Fólkaflokkurin sæð skriftina á vegginum og innsær, at ein loysn á ríkisrættarliga spuringinum má finnast saman við 2 øðrum stórum flokkum. Loysnin má liggja í ABC ella ACE. Tað tykist tíverri sum, at E hevur læst seg fastan í, at samtyktin um sjálvstýri Føroya fólks skal standa óbroytt. Er hetta støðan, ja so er ikki nógv at velja í.

Skuldi tað óvæntaða hent, at samgongan varðveitti meirilutan, so eigur Fólkaflokkurin greitt at melda út áðrenn valið, um hann stendur aftanfyri fullveldispolitikkin hjá E – og ikki minst, um hann tekur undir við undarligu framferð Tjóðveldisfloksins á Fólkatingi, ið neyvan bøtir um nakað samstarvsklima millum Landstýrið og donsku stjórnina.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard

**Christian M. Poulsen**



Setti fyri kortum fram ein spurning um olju/undirgrundina til formenninar í politisku flokkunum ella til tey, ið høvdu hug at svara.

Hevði í veruleikanum ikki væntað at fingið svar frá nøkrum av politisku formonnunum, tí tað kundi jú fingið veljararnar at ørkymlast beint undan vali, hevði tó vóna, at onkur gjørdi spurningin greiðari fyri mær.

Jóannes Eidesgaard nertir tó við spurningin í Sosialinum 20.04.02, har hann sigur:"Sjálvandi er oljan okkara." Víðari sigur Jóannes, at slatur gongur um, at m.a. Javnaðarflokkurin ætlar at geva dønum undirgrundina aftur.

Kanst tú geva nakað, tú ikki eigur?

Ella skal tað ikki takast fyri fult, tá Frank Jensen, løgmálaráðharri í fólkatinginum sigur, at føroyingar ongantíð kunnu fáa ognarrættin til undirgrundina, (Spm. nr. S 1799 svarað 14.3.2001), men við "Råstofaftalen" bert hava tann umsitingarliga og lóggevandi førleikan?

Góði Jóannes, veit, at tú hevur nógv um at vera í hesum døgum, men hevði tú ikki kunna sett eina løtu av og svara mær og helst nógvum føroyingum úr øllum flokkum, hvussu hettar hongur saman? Eiga vit oljuna, sjálvt um vit ikki eiga undirgrundina?

Hetta kann alt kannast nærri á: http://www.folketinget.dk/samling/20001/spor_sv/S1799.htm

# Útjaðari og miðøki - einar heilar Føroyar

**Eyðgunn Samuelsen**
*Valevni fyri Javnaðarflokkin í Norðoyggjum*



Javnaðarflokkurin ferð ikki at góðtaka, at útjaðarin framhaldandi dragnar og ikki fær sín lut í samfelagsmenningini. Vit mugu síggja allar Føroyar sum eina heild, hugsa í økjum og hvussu vit menna tey einstøku økini. Tí vit vilja ikki, at kommunur skulu noyðast at leggja saman, samstundis sum tað er okkum greitt, at tað skulu størri eindir til at nøkta tann tørv á tænastum og skapa tann trivnað ið nútíðarborgarin krevur.

Tað verður neyðugt við ávísum útboði av førleikakrevjandi størvum uttanfyri meginøki. Tískil skulu almennir stovnar og fyrisitingar eisini leggjast uttanfyri miðøkið. Hetta kann lætliga gerast við teimum samskiftismøguleikum ið vit hava í dag. Men framvegis verða góðir samferðslumøguleikar fyritreyt fyri øllum trivnaðinum. Tí vil Javnaðarflokkurin eisini at norðoyatunnilin skal gerast í hesum valskeiðið.

Til tess at stuðla undir eina skilagóða økismenning skulu allar kommunur gera lokalplanir fyri lendisnýtslu o.ø, so at lokalar byggiætlanir og útbyggingarætlanir fyri økini og alt landið kunnu samskipast í eina landsætlan, eina heildarætlan fyri alt Føroyar.

Javnaðarflokkurin vil virka fyri at settur verður landsstýrismaður við ábyrgd av innlendismálum sum er økismenning, útoyggjapolitikkur, kommunalpolitikkur og lógarmál.

Eydgunn@post.olivant.fo

# ES-karið

**Thomas Arabo**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



ES er eitt vandamikið kar at detta í. Tað eru tveir mátar, vit kunnu detta í hetta kar. Ein flokkur í Føroyum hevur alment boðað frá, at hann er fyri ES limaskapi, og tað er Sambandsflokkurin. Vit eru í tí hepnu støðu í dag, at vit hava eitt stabilt gjaldoyra og nakrar fyrimunir, ið annars bert fylgja við ES limaskapi, tí vit eru í ríkisfelagsskapi við Danmark. Hesir fyrimunir hava vit, hóast vit sleppa frá vandunum við ES, sosum felags fiskivinnupolitikk og ráevnispolitikk.

**Ein loysing á leistum kann føra til ES**

Um vit loypa á leistum og loysa í óðum verkum, so kann tað eisini føra til ES. Missa vit m.a. stabila gjaldoyrað og reyða passið, tí føroyingar loysa í tí naivu trúgv, at allir fyrimunirnir við ríkisfelagsskapinum halda fram pr. Automatikk, so kann man gerast noyddur til at søkja um ES limaskap av neyð.

**Í ES fáa vit einki at siga - tosið tá um frælsi!**

Í ES fáa vit einki at siga, tí ES parlamentarikarir verða býttir eftir fólkatalinum, og ein ES kommisær fáa vit heldur ikki við knapt 50,000 sálum. Tann dagin vit standa í ES, so hava vit mist møguleikan at ávirka vinnuligu karmarnar í Føroyum og meira álvarsligt verða vit partur av ES fiskivinnupolitikkinum, ið stendur sum alt annað enn ein fyrimynd. Tá verður tað ES sum forhandlar við russarar og kanadiarar og ikki Føroya Landstýri - tosið tá um frælsi!

Vandin við føroyskum ES limaskapi liggur løgið nokk bæði í Sambands- og Tjóðveldisflokkinum.

Ert tú ímóti ES limaskapi, so vel Javnaðarflokkin 30 apríl


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VALGREINAR

# Góð og gomul

**Heðin Mortensen,**
*løgtingsmaður og valevni Sambandsfloksins*



Vanligt er at tosa um tað góða og gamla. Men í Føroyum eiga tey gomlu ongan góðan. Bæði tey eldru sjálvi og teirra avvarandi eru komin í neyð av, at eldraøkið er forsømt í fleiri ár.

Komandi valskeiðið mugu vit loysa bústaðar- og røktarviðurskiftini hjá teimum eldru. Ongi ellisheim eru bygd seinastu nógvu árini her í Suðurstreymi, meðan alsamt fleiri gerast eldri, og alsamt færri kunnu búgva inni hjá børnum ella øðrum skyldfólki.

Eldraøkið er í dag eitt landsmál, men í staðin fyri at gera nakað við tað, hevur landið latið staðið til.

Tórshavnar kommuna hevur av sínum eintingum gjørt ætlanir fyri eldraøkið, millum annað eitt greitt og drúgt eldraálit. Tórhavnar kommuna hevur keypt Marinustøðina, og kommunan hevur gjørt fyrireikingar til byggjan av heimi til dement fólk. Kommunan hevur avsett sín part av kostnaðinum av íløguætlanini í ár til at byggja hetta heim.

Eftir løgtingsvalið mugu vit raðfesta eldraøkið allarfremst í komandi samgonguni. Vit skulu vera góð við tey góðu gomlu.

# Opið bræv til Runarvíkar býráð

**Sámal Petur í Grund**
*Landsstýrismaður*



Runavíkar býráð samtykti á býráðsfundi 31.mai 2001, at niðurleggja verandi valstøð í kommununi, fyri at upprætta eitt nýtt valstað í kommununi.

At hetta stig fór at møta mótstøðu í bygdunum, sum raktar vóru av hesum, kann ikki vera nakað loyndarmál fyri kommunustýrislimunum.

Hóast hesa sannroynd, so var tað so vítt kunngjørt er, eitt samt býráð sum tók hesa avgerð.

Eftirfylgjandi bleiv heitt á landsstýrismannin í lógarmálum, Høgna Hoydal, um at gera somu broyting í sambandi við løgtings- og fólkatingsval. Hesum ynski gekk Høgni Hoydal á møti og kunngjørdi hann 2. november 2001 hesa broyting at vera galdandi í sambandi við løgtingsval.

Eftir er so at fáa broytt valstøðini í sambandi við fólkatingsval og er áheitan send ríkisumboðnum hesum viðvíkjandi tann 13. novembur 2001.

Undirritaði er ein av teimum, sum skrivaði undir mótmæli sum bleiv handað løgmanni, hesum viðvíkjandi.

Undirritaði gongur inn fyri færri kommunalum eindum og ikki minst, at vit í Eysturoynni, ella um Skálafjørðin, koma at vera í eini kommunu.

Men gongdin við at valstøðini verða niðurløgd er ikki hugalig, slettis ikki tá ein hugsar um at í framtíðini verða nakrar fáar kommunur, og at hetta kann koma at viðføra sama tal av valstøðum.

Tí hevur undirritaði í dag, ígjøgnum Ríkisumboðið, sent innanríkismálaráðnum skriv hesum viðvíkjandi.

Eisini er undirritaði kunnaður um, at løgmansskrivstovan hevur sent býráðnum avrit av áheitanini og undirskriftunum til støðutakan.

Løgmansskrivstovan skrivar í sama skrivi, "Um Runavíkar kommuna ynskir at ganga áheitanini á møti og broyta valstaðið til kommunuval, er landsstýrið sinna at broyta valstøðini til løgtingsval samsvarandi.

Undirritaði er av tí uppfatan, at borgararnir í kommununi eiga at vera upplýstir um:

- hvør grundin til niðurleggingina av valstøðunum er?
- hvør støðutakanin til mótmælini er?

Vónandi ber tað býráðnum til at svara uppá hesar spurningar.

PS. Brævið er eisini sent í posti.

# Góðu veljarar

**Leila Hjørleivsdóttir á Lofti**
*valevni Fólkafloksins í Suðurstreymi*



Eg havi jabbað um hetta í skjótt 14 ár, valdi fyri 4 árum síðani at jabba á einum øðrum stað, tí stillaði eg upp til løgtingsvalið í `98. Eg jabbi enn og ætli mær at blíva við, líka til málið er nátt.

Eg kenni foreldur, ið hava jabbað í 40 ár.

Tí eri eg sera glað fyri, at vit í valskránni hava tikið við, at rørslutarnað skulu fáa tørvin á viðgerð nøktaðan í Føroyum, bæði á sjúkrahúsum og í primeru heilsutænastuni.

At tað ikki burdi verið neyðugt, at sent fólk av landinum til uppvenjingar , sigi eg, tí vit hava fleiri fakbólkar í landinum, oftast útbúnir á sama staði, sum teir fakbólkar vit senda sjúklingarnar til í Danmark.

Vit mugu byrja eitt neyvari samstarv innanhýsis, seta felags mál, sjúklingunum til gagns.

Fólkaflokkurin hevur so sanniliga eisini ein sosialpolitik, men vit hava alla tíðina í huganum, at tað er okkara sjálvberandi búskapur,ið skal kasta av sær til okkara sosialpolitik.

Vit eru klár yvir, at alternativar loysnir mugu finnast, tí almanna- og heilsumál tørva nógv av fíggjarlógini, fyri ár 2002 umleið helvtina av 3,4 mia kr.

Tí hava vit eisini tikið við í valskránna, at vit skulu kanna hvørjar royndir okkara grannalond hava gjørt við væl virkandi sjúkratryggingum.

Men fyrst skulu vit hava ein greiðan heilsupolitik orðaðan í næstu tingsetu.

Vit trúgva uppá, at vit megna at veita teimum borgarum, ið hava tørv á hjálp, so ella so, tað, ið skal til, fyri at fáa eitt virðiligt lív.

At vit síggja fram til tann dag, tá fólkaflokkurin eigur landsstýrismannin ella kvinnuna í almanna- og heilsumálum , tað er ongin loyna.

Annars vil eg heita á tykkum, um ikki at gloyma tey avrik, ið Fólkaflokkurin hevur framt í hesum valskeiðnum.

Gott val, serliga fyri okkum, bindiliðið fyri at fáa suverenar Føroyar.

Sí www.folkaflokkurin.fo

# Vit halda kósina

**Jógvan Arge**
*Valevni tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi*



Eftir 120 ára langt tjóðskaparstríð er tað natúrligt, at Føroyar verða sjálvstøðugt land. Hesum virkar Tjóðveldisflokkurin fyri. Vit arbeiða eftir samtyktini um sjálvstýri Føroya fólks, ið miðar eftir at fremja yvirtøkur og minka blokkin burtur eftir eini fastari ætlan. Tá yvirtøkurnar eru framdar, skal tjóðin taka avgerð um at skipa Føroyar sum fullveldi.

Við fullveldi fara føroyingar frítt at kunna samstarva við Danmark og øll onnur lond á jøvnum føti. Hetta kunnu vit ikki í dag. Undir danska statsvaldinum eru vit hvørki fræls tjóð ella eiga rættin til okkara land. Vit hava heldur ikki ræðið á okkara egnu undirgrund. Henda støða er óvirðilig og ódemokratisk.

Leiðin fram ímóti fullari sjálvstøðu er, at føroyski búskapurin verður sjálvberandi. Vit stevna við stórum fetum fram ímóti hesum máli. Í ár er samlaða framleiðslan hjá føroyingum í Føroyum 9,6 milliardir krónur. Av hesum er danski blokkurin 615 milliónir krónur ella bara 6,4 prosent. Á fíggjarlógini er blokkurin einans 18 prosent av inntøkunum.

Ongantíð er meira umráðandi enn nú at velja sjálvbjargnisleiðina. Valið snýr seg um at halda skil á búskapinum og stevna ímóti fullveldi ella at tøma landskassan og avreiða føroyskt sjálvræði.

Við at halda skil á búskapinum kemur ongantíð veruligt hóttafall á samfelagið. Eftir fýra ár við skilagóðum búskaparpolitikki eigur landskassin nú 2,5 milliardir krónur á bók, og ALS eigur 380 mió kr.

Haraftrat eru nógvir sosialir batar framdir. Pensjónirnar eru hækkaðar. Lønirnar eru komnir upp á rættvíst støði aftur. Lestrarstuðul og barnafrádráttur eru hækkaðir. Karensdagarnir eru burtur, og Landssjúkrahúsið verður útbygt. Komandi árini vilja vit økja vælferðina uppaftur meira. Røktarpláss, alternativir bústaðir, búpláss til fólk við serligum tørvi og døgnrøktarskipan verða raðfest ovast.

Fortreytirnar fyri størri vælferð og framburði eru góðar, tí vinnulívið blómar. Síðani køvandi studningspolitikkurin fekk durafjórðingin, hevur gingið skjótt framá. Serfrøðingar staðfesta, at føroyska fiskivinnan er tann mest lønsama og kappingarføra í Norðuratlantshavi. Hetta herðaklapp hava bæði arbeiðsfólk og leiðslur hjartaliga uppiborið.

Tjóðveldisflokkurin vil, at vinnulívið skal hava tryggar karmar at virka undir. Politikarar skulu ikki leggja seg út í raksturin. Skulu landsins ognir í vinnuni seljast privatum, skal opinleiki valda um sølurnar.

Stevnan er greið. Vel Tjóðveldisflokkin.

# Valtilfar í Sosialinum

Treytir fyri upptøku av valgreinum er, at tilfarið verður latið okkum sum teldupostur ella á diskli. Prísurin er hálvur lýsingarprísur.

Fyri valgreinar á valsíðuni í Internet-Sosialinum er prísurin 50 kr fyri hvørja grein, um ikki onnur avtala er gjørd við flokkarnar.

*Sosialurin*